












# Áhugaverdur vinnubygningur mitt í Tórshavn

Mitt í Havnini stendur hesin frálíki vinnubygningur. Bygningurin er vælhildin og er sera væl egnaður til skrivstovur og handil. Stendur væl fyri mitt í býnum við góðum útsýni. Omanfyri bygningin er ein góð terassa og stórur og hugnaligur havi.

Bygningurin er í trimum hæddum, og verður í løtuni nýttur til Hotel og handil.

Í niðastu hæddin er ein handil "Smykkuhjørnið", sum P/F Sertænastan eigur. Tú hevur møguleika at keypa felagið við smykkulagrinum um tú ynskir hetta. Í handlinum er eitt stórt handilshøli, eitt skrivstovurúm, vesi og ein lítil køkur. Eisini er eitt fýrrum í niðastu hæddini.

Hotellið heldur til á teimum ovaru hæddunum.

Í miðhæddin er eitt stórt dupult kamar, eitt einkult kamar, ein móttøka, uppihaldsrúm, køkur, vaskirúm og ein lítil goymsla. Frá vaskirúminum er útgongd til eina terassu. Á ovastu hæddini eru trý stór dupult kømur, trý einkult kømur, eitt baðirúm við baðikar og eitt baðirúm við brúsu.

Tú fært meira at vita um húsini við at ringja til Skyn á tlf. 35 74 00.

**Fakta:**

| | |
|---|---|
| Add. | Niels Finsensgøta 51, Tórshavn |
| Stødd innan: | 300 fermetrar |
| Hæddir: | Tríggjar |
| Grundøkið: | 334 fermetrar |
| Byggiár: | 1948 |
| Prísuppskot: | Kr. 5.000.000 |

skyn

**Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo**